Fróðskaparsetur Føroya

# ARBEIÐSSETINGUR

## FYRI LÝSING AV BYGNAÐARLIGARLIGUM MØGULEIKUM Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA

### Stýrismandat

Á stýrisfundi 1. og 2. september í ár varð avgjørt at leiðslan á Fróðskaparsetrinum skal gera eitt uppskot til kommissorium (arbeiðssetning) í samband við lýsing av bygnaðarligu møguleikunum á Setrinum, stýrinum at góðkenna.

Arbeiðssetningurin skal verða grundarlag undir einari lýsing av bygnaðarligum møguleikum, sum ein arbeiðsbólkur, settur saman av umboðum frá øllum megindeildunum á Setrinum við einum føstum skrivara, sum skal útvega upplýsingar og tryggja framdriftina í arbeiðinum. Í bólkinum skulu sita 3 lesandi, 4 umboð fyri deildirnar og eitt umboð frá fyrisitingini. Vararektarin verður leiðari fyri bólkinum og fyrisitingarstjórin verður skrivari.

Bygnaðarbroytingar kunnu verða neyðugar fyri at fáa ein betri samskipaðan bygnað, eina samskipaða fyrisiting og øktar møguleikar fyri tvørgangandi undirvísing og gransking, soleiðis at tað sum frálíður verður eitt livandi og ríkt felags granskingar- og lestrarumhvørvi.

Arbeiðssetningurin skal verða liðugur at lata stýrinum í viku 6 í 2010, beint eftir at stýrið hevur fingið uppritið til strategiarbeiðið.

Fyri at tryggja samanhang millum strategitilgongdina og tilgongdina við bygnaðarligu møguleikunum skipar formaðurin fyri ávegis kunning til starvsfólk og lesandi um innihaldið í arbeiðinum.

### Arbeissetningurin

Í lógini um Fróðskaparsetur Føroya frá 9 juni 2008, eru karmarnir um bygnaðin á Fróðskaparsetrinum lýstir. Tann ovasta leiðslan er stýrið, sum setir ein rektara, sum leiðir Fróðskaparsetrið, innan karmar, sum stýri ásetir. Fyrisitingarstjóri og dekanar verða settir av stýrinum eftir tilmæli frá rektaranum og røkja sínar uppgávur við heimild frá rektaranum og vísa til rektaran. Hini starvsfólkini setur rektarin ella tann, ið rektarin hevur heimilað setanarmyndugleika.

Rektarin kann sær til hjálpar seta eitt akademiskt ráð. Gransking og undirvísing fer fram á megindeildum, harundir deplum og granskingarkjarnum. Dekanurin hevur her ábyrgdina og skal tryggja dygd og samanhang millum gransking og útbúgving og kann sær til hjálpar seta lestrarráð eftir tørvi.

Arbeiðsbólkurin skal fyrst og fremst:

- Definera og skipa megindeildirnar á setrinum, millum annað kanna møguleikan fyri at deildirnar kunnu verða færri í tali enn nú (smb. § 16).
- Definera arbeiðsuppgávurnar og heimildirnar hjá dekanunum (smb. § 15).
- Definera akademisk, fyrisitingarlig og tøknilig størv so starvsinnihaldið verður greitt og dynamiskt.

- Økja um møguleikar fyri tvørgangandi gransking í samstarvi við aðrar føroyskar stovnar.
- Seta karmar fyri skipan av lestrarráð og uppgávum tess (smb. § 17).
- Seta karmar fyri skipan av akademiskum ráð og uppgávum tess (smb. § 18).
- Starvsfólkapolitikkur/Samstarvsráð.
- Seta upp karmar fyri samskifti innanhýsis og uttanhýsis.
- Seta karmar fyri umsiting av fíggjarviðurskiftum, harundir menning av undirstøðukervinum og inntøkukeldum afturat almennu fíggingini.

Samtykt av stýrinum 14. oktober 2009